# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

Víkingur-EB/Streymur 0-2 (0-1):

# Levi Hanssen blásti Víkingar suðureftir

*Víkingur*

*EB/Streymur*

**Í nógva vindinum í Sarpugerði megnaði EB/Streymur betur at fóta sær enn Víkingur gjørdi, og tí vann EB/Streymur við Levi Hanssen á odda trý týðandi stig, meðan Víkingar liggja syðri á talvuni enn teir ætla**

**FÓTBÓLTUR**
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

171 sentimetur stutti Levi Hanssen gjørdist stóri maðurin í Sarpugerði í gjár, tá EB/Streymur vann trý týdningarmikil stig, meðan Víkingar kunnu iðra seg, at teir ikki megnaðu at stríða EB/Streym út á Gøtuvík.

Fyrsta málið fekk Levi Hanssen, tá fyrri hálvleikur var næstan hálvrunnin. Liðskiparin hjá EB/Streymi, Egil á Bø, setti ferð á mitt gjøgnum vøllin, har hann eftir ein óvanliga langan driblitúr fann Leif Niclasen, sum legði bóltin inn til Levi Hanssen, sum bæði tamdi og skeyt bóltin í málið við vinstra beini.

Tá vanliga leiktíðin var farin staðfesti fyrrverandi skálamaðurin og B36arin sigurin, tá hann gjørdist leysur og skallaði bóltin framvið Geza Turi í Víkingamálinum, og tí liggur EB/Streymur nú á fjórða plássi í Vodafonedeildini

## Bæði máttu vinna

Hóast talan var um tvey lið, ið lógu um miðjuna av deildini, so var talan um ein sera týdningarmiklan dyst, tí bæði liðini kundu við einum sigri ota seg upp at toppinum, samstundis sum eitt tap í fyrstu atløgu merkti, at liðið var sett av í toppstríðnum.

Tað var nokk her, at tað sást, at teir myrkabláu og svørtu, sum dysturin leið vóru greiðari yvir hesar treytir, enn hvat teir ljósabláu og svørtu vóru. Tí tað var fyrst og fremst viljin, ið vísti seg at vera munurin, sum dysturin leið.

Men soleiðis var ikki allan dystin, tí fyrstu 20 minuttirnar vóru Víkingar omaná.

## Víkingar byrjaðu best

Í nógva vindinum, sum ofta kemur úr Gøtudali var tað tó Víkingur, ið fótaði sær best fyrstu løtuna. Teir høvdu tað mesta av spælinum, men gjørdust ongantíð veruliga vandamiklir. Helst av tí, at Sorin Angel, sum í gjár spældi í miðverjuni, og Egil á Bø vóru sera raskir at demma fyri Andreasi Lava Olsen, sum plagar at vera ein stór hóttan.

Tó høvdu teir yvirtakið, og fingu nøkur skot úti frá, sum Gunnar á Steig – sum framvegis stendur í málinum fyri skadda René Tórgarð, sum helst hevði verið fyrsta val, um hann var við – ikki fekk nakrar stórvegis trupulleikar við.

Kanska merkti tað eisini dystin, at Hans Jørgen Djurhuus, sum er mest skorandi Víkingurin í ár, var óvildugur áskoðari til dystin.

EB/Streymur lá rættiliga langt afturi á vøllinum, og bíðaði eftir møguleikum fyri snarálopum. Hesir skuldu eisini koma, og tað var eftir eitt tilíkt, at EB/Streymur fekk fyrra málið.

## EB/Streymur tók yvir

Eftir málið var lítið veiggj í Víkingum, sum ikki líktust sær sjálvum. Teir fóru ofta bara hálvir inn í taklingarnar, og EB/Streymsleikarar vunnu flestu nærdystirnar, hóast heili fýra teirra megnaðu at fáa gul kort. Onkur vóru helst á markinum til reytt, men Dagfinn Olsen, metti ikki, at so var.

So hvørt sum dysturin leið tók EB/Streymur meira yvir. Gudmundur Nielsen og Hans Pauli Samuelsen vísti seg at hava nøgvar verjuuppgávur á veingjunum, so tað var mest beinleiðis gjøgnum miðjuna, at EB/Streymur kom til sínar møguleikar, sum Geza Turi ofta bara fekk boksað burtur.

Hinvegin hevði Víkingur nakrar deyðbóltar, sum teir kundu fingið nakrar møguleikar burturúr, men kanónin hjá Súna Olsen, var ikki líka bein, sum hon ofta hevur verið.

So hvørt sum dysturin leið gjørdust Víkingarnir meiri mótfalnir, og tað gjørdist ikki betri, tá Andreas Lava Olsen fór út við skaða í seinna hálvleiki.

Í yvirtíðini var tað so, at Levi Hanssen staðfesti, at Víkingarnir fóru bardir úr Sarpugerði, og tí liggja teir framvegis í miðjuni av deildini, meðan EB/Streymur vann trý kærkomin stig, eftir tvey fylgjandi lak umfør.




*Myndatekstur: Levi Hanssen gjørdist við tveimum týðandi málum glaðasta maður í Sarpugerði í gjár*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## FAKTA um dystin

**Víkingur-EB/Streymur 0-2 (0-1)**
**0-1:** Levi Hanssen, 25.
**0-2:** Levi Hanssen, 90.
**Dómari:** Dagfinn Olsen
**Víkingur:** Geza Turi – Símun Louis Jacobsen (Magnus Skoralí¨, 65., Niclas Niclasen, Atli Gregersen, Hanus Jacobsen – Sølvi Vatnhamar, Súni Olsen, Sam Jacobsen – Finnur Justinussen, Andreas Lava Olsen (Martin Olsen, 74.), Sverri Jacobsen (Áslakur R. Petersen, 86.)
**Gult kort:** Símun Louis Jacobsen, Niclas Niclasen, Hanus Jacobsen, Atli Gregersen
**EB/Streymur:** Gunnar á Steig– Bárður Olsen, Egil á Bø, Sorin Anghel, Alex Jose dos Santos – Levi Hanssen, Marni Djurhuus, Brian Olsen – Gudmund Nielsen (Arnbjørn T. Hansen, 81.), Leif Niclasen, Hans Pauli Samuelsen
**Gult kort:** Egil á Bø

## Glaðasti maður í Gøtu

Levi Hanssen noktaði ikki fyri, at hann í gjár var glaðasti maður í Gøtu. Men mest errin var hann tó av liðnum.

- Tað var øgiliga týdningarmikið at vit vunnu í dag, og vit kempaðu øgiliga væl, segði Levi Hanssen við Rás2, sum sendi beinleiðis í gjár.

Hóast alt er hann errin av málunum hann fekk.

- Eg kippaði hann inn í besta Del Piero stíli, segði hann týðiliga fegin í gjár. Um seinna málið greiddi hann frá, at hann kendi seg merkiliga leysan, og var glaður fyri at skora upp á hornaspark, sum hann ikki upplivir ofta.

Somuleiðis fegnast hann, at liðið aftur snoddar til oddin.

- Byrjanin hevur ikki ordiliga verið nøktandi, tað var so týdningarmikið at hanga í oddinum, so tað er eitt gott vikuskifti fyri EB/Streym, staðfesti hann á Rás2.

**-eij**

## Kunnu takka okkum sjálvum

Sølvi Vatnhamar var sera vónbrótin av avrikinum hjá Víkingum í gjár.

- Vit koma ov seint í gongd. Fara inn í nærdystirnar, sum vit plaga, men finna ikki útav at avslutta, tá vit skulu, segði Sølvi Vatnhamar við Rás2, sum tó metir, at EB/Streymur var betra liðið.

- Eftir fyrra málið kundu teir lossa bóltar, og tað gera teir so restina av fyrra hálvleiki, metti Sølvi Vatnhamar.

Um seinna málið segði víkingurin, at orsøkin til seinna málið var, at maðurin, ið skuldi dekka Levi Hanssen var uppi á miðjuni.

Hinvegin er hann sannførdur um, at vit ikki hava sæð tað besta av Víkingi, og at teir fara at koma sterkt aftur.

**-eij**